*Grein eftir Roffi Khatchadourian, í The New Yorker (5. nov.)*



*»...Tá ið vit koma, so doyr eingin hvalur!« - Paul Watson við ný sælendskar fjølmiðlar.*

Sanctuary beinanvegin.«

Meðan Hunter og Kaiko Maru sigldu gjøgnum tjúkka ísin rendu skipini saman. Hunter fór at hella,

**Sambært The New Yorker:**

*Abbi Watson, Otto Larsen, var dani. Hesin varð, sum tanáringur, útvístur úr Danmark, tí hann ikki vildi níga fyri drotningini.*

nærum 30 stig og rendi inn í ein stóran ísflaka. Samanstoyturin gav Hunter nakað av skaða á skrokkin. Úr hátalara svaraðu teir aftur á Kaiko Maru við eini upptøku, ið á enskum segði: »Ávaring! Ávaring! Hetta er kapteynurin umborð á Kaiko Maru. Steðgið alt fyri eitt við tykkara atsókn! Um tit vága tykkum at koma umborð verða tit handtiknir og hildnir í varðhaldi sum ólógligir innbrótarar undir japanskari lóg.« Manningin kastaði roykbumbur yvir á Kaiko Maru og fløkjur av langum plast-endum vóru aftur kastaðar út. Ein av hesum gjørdi seg fasta í skrúvuni hjá Kaiko Maru. Tyrlan hjá Sea Shepherd, útgjørd við eini filmsmanning, fleyg nakrar ferðir lágt yvir skipunum. Farley kom eisini fram á skipini, og Watson kallaði á Hunter: »Lat okkum gera tað soleiðis, at hann ikki sleppur undan okkum.« Kapteynurin á Kaiko Maru sigldi aftur uppat Hunter í eini royndat at sleppa leysur, síðan sendi hann út neyðarkall, og segði, at okkkurt var galið við við skrúvuni. Og eftir eini løtu, tá ið einki annað var at gera, agtaði hann treyðugt boðini frá manningunum hjá Watson...

Í nakrar tímar lógu skipini á sama staði. Watson hevði nú steðgað einum hvalabáti úti á opnum havi, men hann var noyddur at taka avgerðið út frá tí, at hann ikki hevði nakran myndugleika at gera so. Við eini fylgissveinatelefon ringdi hann myndugleikar í Ný Sælandi og Avstralia upp – bæði londini hava gjørt krav á ognarrætt yvir Southern Ocean og eru harðliga ímóti hvalaveiðu. Hann bað teir taka japanska skipið í varðhald. Bæði londini noktaðu. Avstralski umhvørvismálaráðharrin, Malcolm Turnbull, avvísti alment tað, ið Sea Shepherd hevði gjørt úti á havinum. »At seta lív, og før í vága, er púrasta burturvið.« Segði hann. »Tey mugu seta tryggleika og frið í hásæti. Við at seta lív í vága á hendan hátt er teirra virksemi ikki til frama fyri rørsluni ímóti hvalaveiðu.« Ný Sælendsku mynduleikarnir svaraðu neyðarkallinum hjá Kaiko Maru og kallaðu á Watson. »Hesir eru í holt við ólógligum virksemi her«, segði Watson við teir. Myndugleikarnir góvu honum ordrar um at lata Kaiko Maru frítt sigla víðari, Watson gav seg.

Av tí at Watson ikki hevði myndugleika at noyða Kaiko Maru í land, so gjørdi hann brúk av tí, sum hann hevði: fjølmiðlarnar. Tíðliga á degnum, ímeðan Farley sigldi eftir Kaiko Maru, prátaði hann við avstralsk og ný sælendsk tíðindafólk yvir fylgissveinatelefon. Hann royndi at fáa tey at skriva um japansku hvalaveiðuna. (Watson gramdi seg um fjølmiðlarnar fyri manningini á brúnni, og segði: »Tað er bara spenningurin millum menniskjur, ið vekir ans hjá fólki. Eingin setur spurnartekin við at hvalir doyggja herúti.«) Watson segði fyri tíðindafólkum, at um hvørki Avstralia ella Ný Sæland stegðaðu japansku hvalaveiðuni, so fór hann eftir Nisshin Maru og fór at ásigla tað. Hóast tað neyvan var sannlíkt at hetta fór at henda, tí Nisshin Maru var jú fleiri hundrað kilometrar harfrá, so hevði hetta eina ávirkan. Í fleiri dagar brúkti andstøðan í avstralska tinginum hesar hendingar til at finnast at sitandi stjórnini. Tann eini ráðharrin úr arbeiðaraflokkinum segði, at um hansara flokkur varð valdur, so fóru avstralsku vaktarskipini at vera send út at leita eftir »ólógligari« hvalaveiðu í økinum Southern Ocean. Ný sælendski Chris Carter, ráðharri fyri umhvørvis- og djóraverndarmál, ringdi til Watson og ráddi honum frá at føra sína hóttan út í verk. Stutt eftir kunngjørdi Carter í fjølmiðlunum: »Eg havi gjørt tað greitt fyri hr. Watson, at Ný Sæland er harðliga ímóti hvalaveiðu og vil halda fast um hesa støðu á altjóða pallinum.« Watson svaraði við at siga við The New Zealand Herald, at hann slepti hóttanini. »Vit fara ikki at ásigla Nisshin Maru, men vit vilja forða einaoghvørjari hvalaveiðu, ið vit koma framá. Eg fari ikki at síggja ein hval doyggja. Síðan eg fór úr Greenpeace í ´77 havi eg ikki sæð ein hval lata lív. Tá ið vit koma, so doyr eingin hvalur.«



## 1983: M*A*S*H hjálpir Watson

Tvey ár undan fyrstu vitjan hansara í Føroyum varð hann í Kanada handtikin í sambandi mótmælistiltøk ímóti kópaveiðu. Hann sat í varðhaldi í fleiri dagar og skip hansara var tikið frá honum. Men sjónleikarin Mike Farrell, kendur frá leiklutinum í skemtirøðini »M*A*S*H« sum Cpt. B. J. Hunnicut, betaldi loysigjaldið. Watson slapp eisini undan ákærunum og fekk skipið, Sea Shepherd II, aftur.

## Fakta

**Tíðarætlan Watsons 2007-08, við skipinum Farley:**

- Úr avstralskari havn 19. februar.
- Yvir Stillahavið til Galapagos, Ekvador, mai.
- Í juli var Watson og Farley enn í ekvadorianskum farvatni, hetta er tað seinasta, ið greinaskrivarin hjá The New Yorker nevnir um Watson.
- Ætlanin hjá Watson var at fara til »Grand Banks« út fyri New Foundland at gera mótmælisatsóknir móti botntroling. Síðan so »møguliga til Íslands at mótmæla hvalaveiðu har.« Men í juli avger hann ikki at fara norður til New Foundlands, men at verða verðandi á leiðini kring Galapagos.

Í síðstu novemburdøgunum skal Watson halda fyrilestrar í avstralskum býum.